# unnar heimamarknaðin



*Á skrivstovuni sitir Esther og tekur telefonina, tá ið viðskiftafólk ringja. Hon tekur sær eisini av innkeypinum hjá felagnum, Sp/f Norðfra*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Útkoyring av vøru**
Á heimasíðuni sæst eisini, nær fólk kring landið kunnu fáa tær vørur, sum bílagdar verða úr Norðdepli.

Í stuttum kann sigast, at Norðfra koyrir vørur ú í Klaksvík og Norðoyggjum, har landafast er, hvønn gerandisdag eftir klokkan 16.

Á meginlandinum, Eysturoy, Norðurstreymoy, Vágum og í høvuðsstaðarøkinum, fáast vørur beinleiðis úr Norðdepli eftir eini fastari skipan aðru hvørja viku.

Á heimasíðuni verður tó lagt aftrat, at til ber eisini at fáa vørur í úrtíð.

**Heimsins besti!**
– Vit eru veitari av fyrstafloks fiskavørum til føroysku heimini. Okkara endamál er at gera tað møguligt hjá einum og hvørjum í Føroyum at njóta tann góða fisk, sum fæst úr heimsins reinasta havumhvørvi.

Á heimasíðuni gevur Norðfra eisini vitjandi høvi at gera viðmerkingar til "konseptið", sum virkið bjóðar.

– Tínar viðmerkingar eru við til at gera okkara konsept betur, sigur felagið.

**Easyfisk í DK**
Norðfra kunnar eisini um samstarvsfelagan í Danmark, sum er at finna á Easyfisk. dk

– Tað eru føroyingar, sum búleikast í Danmark, ið selja somu góðu vørur, sum Norðfra selir á heimamarknaðinum í Føroyum. Hesir selja bæði til privat viðskiftafólk og til vinnurekandi, sigur Norðfra, sum rættiliga hevur gjørt seg galdandi við sínum fiskavørum á føroyska marknaðinum.

Í Sosialinum týsdagin vístu vit á, at av einum umsetningi í fjør upp á slakar 20 mió krónur, stavaði umleið ein fjórðingur av søluni hjá Norðfra frá føroyska heimamarknaðinum.



*Vørurnar hjá Norðfra eru væl umtókar í føroyska køkinum*




*Norðfra hevur gjørt faldarar, sum lýsa tær vørur, sum felagið framleiðir til heimamarknaðin – umframt tær vørur, sum felagið umboðar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*